# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Deildarleiðari til Tænastudeildina

Eitt spennandi og mennandi fulltíðarstarv sum deildarleiðari til nýggju Tænastudeildina er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

Tænastudeildin er ein nýsamanløgd deild av Reingerðardeildini og Húsavørðinum. Í høvuðsheitum umfatar arbeiðið hjá Tænastudeildini innan- og uttandura reinhald, borðreiðing av mati til sjúklingarnar og flutningsuppgávur. Deildin skal skipast í sjálvstýrandi bólkar, og fær tann í settur verður, ábyrgd av hesari broytan.

Tað starvast umleið 65 starvsfólk í Tænastudeildini. Arbeiðið fevnir um alt Landssjúkrahúsið við 25 bygningum, 50.000m2 gólvvídd og 150.000m2 uttandura øki. Samla játtan til deildina er um 17. mió. kr.

Deildin nýtir kt-skipanina HOW2PLAN sum amboð í fyrireikingini av arbeiðinum.

**Førleikakrøv**
- relevant útbúgving og fakligar royndir innan omanfyri nevndu uppgávur
- hollar leiðsluroyndir
- edv-kunnleiki á brúkarastøði
- kunnleiki til leiðslukunningarskipan landsins og vaktplansskipanina

**Persónligir eginleikar**
- góður røkjuskapur og analytiskar gávur
- góð samstarvsevni og evni til at útbýta arbeiðsuppgávur
- duga at stinga út í kortið og selja ein boðskap
- duga at síggja møguleikar fram um forðingar
- jalig/ur við tænastusinni
- halda høvdið kalt og renna skjótt, tá tað er neyðugt
- framsíggin

**Vit kunnu bjóða**
- eitt spennandi starv, sum tú sjálv/ur hevur ávirkan á
- góðar samstarvsfelagar og dugnalig starvsfólk
- neyðuga upplæring

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jan á Argjaboða, depilsleiðara í Tænastu-deplinum, tlf. 212337, t-postur lsjanar@ls.fo

**Umsóknarfreistin er** 27. oktober 2008 kl. 12.00
Umsóknirnar verða viðgjørdar í trúnaði.

## Kost- og føðslufrøðingur ella køkshjálp (avloysarastarv)

Til køkin á Landssjúkrahúsinum søkja vit eftir kost- og føðslufrøðingi ella køkshjálp til fulltíðarstarv í tríggjar mánaðar í tíðarskeiðinum 1. november 2008 til og við 31. januar 2009.

**Førleikakrøv, um tú er kost- og føðslufrøðingur**
- útbúgving sum kost- og føðslufrøðingur ella líknandi útbúgving
- áhugi og fleksibilitetur í mun til uppgávurnar
- fakligur dugnaskapur

**Harumframt eru førleikakrøvini**
- samstarvsvilji
- sjálvstøðugleiki
- ábyrgdarkensla

**Vit kunnu bjóða**
- eitt spennandi og avbjóðandi arbeiði
- eitt arbeiðspláss í menning
- at arbeiða saman við góðum og dugnaligum starvsfeløgum

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Karl J. Granz, deildarleiðara, telefon 304500, lokal 1260, t-postur lskargr@ls.fo

**Umsóknarfreistin er** 27. oktober 2008

## Onnur størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Varaleiðarar til Bráðdeildina G1**
Umsóknarfreistin er 13. oktober 2008 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðdeildina G1**
Umsóknarfreistin er 13. oktober 2008 kl. 12.00

**Goymsluleiðari**
Umsóknarfreistin er 14. oktober 2008 kl. 12.00

**Introduktiónsstarv til Psyk. depil**
Umsóknarfreistin er 17. oktober 2008

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Útistovu (B3)**
Umsóknarfreistin er 19. oktober 2008 kl. 12.00

**Læknaskrivari til Med. depil**
Umsóknarfreistin er 20. oktober 2008 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

---

Ljósmøðrafelag Føroya og vikarstovan Føroya Care hava tann 1/10-2008 gjørt sáttmála sínamillum.

Ljósmøður, sum eru áhugaðar, kunnu nú skráseta seg hjá Føroya Care vikarstovu.

Innskrivingarskjal er á heimasíðuni.

**Føroya Care**
VIKARSTOVA

**Magnus Heinasonargøta 26 · Postboks 312 · FO-110 Tórsh**
**Tlf. 28 00 96 / 28 00 97 · foroyacare@email.fo · www.foroyacare.fo**

---

# KUNNGERÐ

Við hesum verður gjørt kunnugt, at vallistin til kommunuvalið 11. november 2008 fyri valdømið í Funnings kommunu liggur frammi til alment eftirlit Funnings skúla í døgunum frá 14. oktober 2008 til 28. oktober 2008 frá kl. 17.00 til 19.00 yrkadagar.

Kæra um, at onkur ikki er komin á listan ella, at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera býráðnum í hendi í seinasta lagi 04. november 2008.

**Funnings kommuna**
**07. oktober 2008**

---



# Hús til sølu

Við hesum verða eini hús til burturtøku lýst til sølu. Húsini eru uml. 18 fermetrar til víddar. Tey hava verið brúkt til handil, posthús og hárfríðkanarstovu, men eru eisini vælegnaði til summarhús.

Húsini standa í Leynum. Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 721569

---

# Lesið Sosialin -so eru tit við!